Kunngerð frá

## útskiftingarnevndini fyri Kvívík

Útskiftingarnevndin fyri Kvívík hevur á fundi 27. mars 2018 viðgjørt kæruna um góðskumetingina av jørðini. Nevndin staðfesti góðskumetingina, ið var løgd fram á útskiftingarfundi í Glæmuni í Kvívík 8. februar 2018 við hesum broytingum:





| | | |
|---|---|---|
| matr.nr. 148a | lutur nr. 737 | broyttur til 30 % |
| matr.nr. 173a | lutur nr. 1002 | broyttur til 30 % |
| matr.nr. 234a | lutur nr. 1250 | broyttur til ovara helvt óvelt 30 % og niðara helvt velt 60. |
| matr.nr. 424 | lutur nr. 688 | broyttur til 0 % |
| matr.nr. 421 | lutur nr. 987 | broyttur til 0 % |

Eftir §51 í lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 um útskifting við seinni broytingum verður góðskumetingin latin til serskilda ákæru.

Kort og eigaralistar liggja frammi á kommunuskrivstovuni í Kvívík og á Umhvørvisstovuni. Dagførd metkort eru at finna á kortal.fo.

Kærufreistin er 3. mánaðir frá 14. mai 2018 at rokna. Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, C. Pløjensgøta 1, postboks 28, 110 Tórshavn.

Kærur skulu vera Sorinskrivaranum í hendi í seinasta lagi tann 14. august 2018.

Eigarar hava møguliga at seta fram ynski um hvar teir vilja hava sína jørð lagda. Eisini hava eigarar møguleika at seta fram ynski um broyting av garðahaldi.

Ynskini skulu sendast til Útskiftingarnevndina innan 3. september 2018, Traðagøta 38, postboks 2048, 165 Argir ella á us@us.fo

**Arnold Thomassen, útsk. form.**